# Ársfrágreiðing fyri Vísindasiðseminevndina 2021

Vísindasiðseminevndin er sett við heimild í "Lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter", sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan í 2013, seinast broytt 29. juni 2021.

Nevndin hevur sjey limir, fýra leikfólk og trý fakfólk við granskingarroyndum innan heilsuvísind.

Limirnir í 2021:

- Jens Andreassen, formaður, cand.med og granskari (fakfólk)
- Gunnhild Helmsdal, cand.med og granskari (fakfólk)
- Ann E. Østerø, bioanalytikari og leiðari á Diagnostiska Deplinum, LS og skrivari í nevndini (fakfólk)
- Oluf Færø, næstformaður, cand.scient (leikfólk)
- Kári Purkhús, cand.scient í lívfrøði og ítrótti (leikfólk)
- Poula Reinert-Petersen, cand.scient.san og leiðari innan eldraøkið (leikfólk)
- Armgarð Arge, cand.theol og tíðindakvinna (leikfólk)

Skrivari: Ann E. Østerø

Endamálið hjá Vísindasiðseminevndini er at tryggja, at heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir eru skipaðar á vísindasiðsemiligum tryggum grundarlagi. Sum grundregla skulu rættindi og tryggleiki hjá royndarpersóninum takast framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking.

Avgerðir hjá føroysku vísindasiðseminevndini kunnu kærast til NVK (Nationale Videnskabsetiske Komité) í Danmark. Sami kærumøguleiki er fyri avgerðir tiknar av staðbundnu vísindasiðseminevndunum í Danmark.

Umframt lóggávuna fyriheldur nevndin seg til almennu meginreglurnar hjá NVK, soleiðis sum tær eru tøkar á heimasíðuni www.nvk.dk.

## *Fundir og umsóknir*

Sum undanfarna árið, var 2021 eisini sermerkt av coronafarsóttini. Nevndin hevði 14 fundir, harav fleiri av teimum vóru videofundir. Nevndin viðgjørdi 27 umsóknir og fyrispurningar viðv. granskingarverkætlanum, harav:

7 nýggjar verkætlanir vóru góðkendar
5 ískoytis- ella broytingarverkætlanir vóru góðkendar
6 verkætlanir fingu longda freist
1 verkætlan var ikki góðkend
2 verkætlanir vórðu annulleraðar og sendar inn av nýggjum
2 verkætlanir kravdu ikki góðkenning
4 fyrispurningar um verkætlanir og innlit fingu svar

Í hvørjum einstøkum føri kom nevndin til eina felags niðurstøðu, og ongin niðurstøða kravdi atkvøðugreiðslu í nevndini.

Av 27 umsóknum og fyrispurningum kravdu 3 longri enn 60 daga viðgerð.

## *Góðkendar verkætlanir 2021*

1. *"Glykogen og vøddamøði undir intervalarbeiði við serligum fokusi á kalium regulering".*
2. *"Ískoytisverkætlan til Ph.d.- og forskningsprojektet "Familiær hyperkolesterolæmi på Færøerne"" –* Leinging
3. *"Optimering av vøddahita í fótbólti"*
4. *"Medication use and health status among elderly Faroese citizens (Nýtsla av heilivági og heilsustøðan hjá teimum elstu føroyingunum – 90 ár og eldri)".*
5. *"FarGen Phase II: Understanding the genetic background of the Faroese people and ascertaining the genetic impact on autoimmune and metabolic disease in the Faroese population".*
6. *"Developing a Drug Response Prediction platform for personalized anticancer treatment starting for the Faroe Islands - (HBOC nýggj verkætlan)".*
7. *"HBOC (gamla verkætlanin)" – Leinging.*
8. *"Improvement of neonatal screening for treatable genetic conditions and evaluation of carrier frequency for lethal disorders in the Faroe Islands" – Broyting.*
9. *"PSORIASIS – FÆNOTYPER OG GENOTYPER – I DEN FÆRØSKE BEFOLKNING – en befolkningsundersøgelse" – Leinging.*
10. *"FarGen Phase II: Understanding the genetic background of the Faroese people and ascertaining the genetic impact on autoimmune and metabolic disease in the Faroese population" – Broyting.*
11. *"Pneumococcal serotypes in invasive disease and change in pneumococcal carriage and disease prevalence in the Faroe Islands".*
12. *"Demens/Alzheimers sjúka í Føroyum – ein genetisk, umhvørvis og ættarbands kanning" – Broyting.*
13. *"Heilsa og andsevnir hjá eldri føroyingum – ein 10 ára uppfylgjandi kanning (70 ára kohortan)" –*

*Broyting.*

14. *“Describing the Genetic Architecture of Inflammatory Bowel Disease in the Homogeneous Population of the Faroe Islands” – Leinging.*
15. *“Healthy control individuals for research of Attention-Deficit/Hyperactivity Disorder (ADHD) in the Faroese population” – Leinging.*
16. *“Immunverjan í kroppinum móti COVID-19 – við og uttan koppseting”.*
17. *“Identifying susceptibility genes associated with hereditary breast and ovarian cancer (HBOC) syndrome in the Faroese population” – Leinging.*
18. *“FarGen 2 – kunningartilfar” – Ískoyti.*

### Virksemi og netverkan

Eins og í 2020 vórðu øll ætlað tiltøk avlýst vegna coronafarsóttina.

Næstformaðurin hevur tó, eins og undanfarin ár, havt framløgu fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum um galdandi vísindasiðsemiliga lóggávu og givið góð ráð í samband við ætlan um granskingarverkætlanir.

### Eftirlit við verkætlanum

Uppgávan hjá Vísindasiðsemisnevndini er, sambært fyriskipanini, sum nevndin virkar eftir, grein 28 og 29, at hava eftirlit við teim verkætlanum, sum loyvi er givið til.

Í 2021 vitjaði Vísindasiðsemisnevndin tríggjar tilvildarliga útvaldar granskarar fyri at kanna, hvussu gekst við verkætlanum teirra. Og aftur hesaferð var sera áhugavert at hoyra granskarar greiða frá úrslitum, avbjóðingum og ætlanum viðvíkjandi granskingini. Nevndin hevði onki at finnast at á hesum vitjanum.

Vinaliga

Ann E. Østerø
Skrivari í Vísindasiðseminevndini